# Greivinnan doypti føroyskan OL-bát

**Katrin Olsen og Juliane Elander Rasmussen hava fingið nýggjan bát at rógva í á Olympisku Leikunum í Beijing. Báturin og rógvararnir hava Eik Banka sum sponsor, og báturin eitur Alexandra. Eingin minni enn Alexandra, greivinna av Frederiksborg, hevur doypt bátin**

OL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at rógvikappingar upp undir Olympisku Leikirnar eru fingnar frá hondini, er nú endaliga staðfest, at Katrin Olsen og Juliane Elander Rasmussen eru kvinnurnar, ið skulu umboða Danmark og kapprógva í sonevnda lættvekts dupult scullara sínum í Bejing.

Hetta er greitt, nú nevndin í Danmarks Idræts-Forbund hevur tikið formliga avgerðina og útnevnt teir báðar rógvararnar.




*Stór bros meðan greivinnan av Frederiksborg doypir føroyska OL-bátin "Alexandra". Bæði báturin og rógvararnir hava føroyskan høvuðssponsur, nevniliga Eik Banka. Frá vinstru: Katrin Olsen, Juliane Elander Rasmussen og Alexandre, greivinna*

### Til OL í nýggjum báti

Olympisku Leikirnir verða sett í kinverska høvuðstaðnum tann 8. august, og tá Katrin Olsen og Juliane Elander Rasmussen setast við árarnar í Beijing, er tað í einum nýggjum lættvekts dupult scullara.

Tær báðar tóku bátin í nýtslu nakað herfyri, men frammanundan skuldi báturin hava navn og doypast.

Hetta fór fram við eitt hátíðarhald í Danmark, og tað var ikki hvør sum helst, ið stóð gumma at bátinum.

Tá dópurin skuldi byrjað, trein ongin annar enn Alexandra, greivinna av Frederiksborg, fram á pallin. Tá stundin kom, tók hon – sum myndin eisini vísir – silvursteyp í hond og lat sjampanjuna renna, meðan hon bar fram nøkur góðynski.

Ikki heilt óvæntað fekk OL-báturin navnið Alexandra.

### »Føroyskur« bátur

Hóast lættvekts dupult scullarin á ongan hátt er ein føroyskur kappróðrarbátur, kann á ein hátt sigast, at OL-báturin hjá Katrini og Julianu er føroyskur.

Hetta kemst av, at Føroya størsti banki, Eik Banki, stendur sum høvuðssponsorur hjá bátinum og hjá teimum báðum rógvarunum.

Á myndini sæst eisini, at navnið "Alexandra" er stavað við Eik-skriftini, ið bankin brúkar í sínum samskifti á marknaðinum.

# Brandansútferð til Gøtutróndaavdúking

**Ein heil armada, Norðlýsið, Enniway og Brandan, fer til avdúking av standmynd av Trónda í Gøtu leygardagin. Farið verður frá Skeivapakkhúsi kl. 9**

TRÓNDARDAGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Seinnapartin leygardagin verða Tróndardagarnir settir í Gøtu við eitt nú avdúking av standmynd av tjóðarhetju okkara, Trónda í Gøtu. Sum nakað heilt fyri seg og sum eina eyka uppliving fara tey, sum reka Norðlýsið, Enniway og Brandan útferð til Gøtu. Tú sleppur at uppliva sjógvin fyri og eftir avdúkingina.

Birgir Enni, eigari og skipari og eisini kosin ársins føroyingur í fjør hevur tikið stig til hesa forkunnugu Gøtutróndaferð sigur við Portalin, at farið verður frá Skeivapakkhúsi leygarmorgun klokkan 9. Siglt verður inn á Gøtu við fólkunum, sum tá kunnu vera við til fyrstu spennandi tímarnar av Tróndardøgunum, har serstakliga til avdúking av standmynd. Høvi verður eisini at hoyra bisp og løgmann røða umframt mangt annað er á skránni.

Okkurt verður so til matna umborð á heimferðini. Bátarnir eru aftur í Havn um klokkan 18. Fólk, sum vilja fara sjóvegis til aldarinnar tiltak í Gøtu leygardagin, kunnu ringja til Birgir Enni á 218520. Pláss eer fyri umleið 75 fólkum umborð á teimum trimum førunum.



*Enniflotin - Brandan, Norðlýsið og Enniway – fer til Tróndardagar leygardagin*